Kyndil-StÍF 23-29 (11-14):

# Strandingar seta ferð á



**Eftir eina heldur laka byrjan, tykjast strandingar spakuliga at hava fingið ferð á undirhaldandi álopshondbóltin**

HONDBÓLTUR, MENN
*Jákup Mørk*

Strandingar hava ikki fingið bestu byrjanina upp á hondbóltskappingina í ár, har teir báðir fyrstu dystirnir góvu tap móti ávíkavist Neistanum og VÍF. Sum tað sær út, so eru júst hesi bæði liðini tey sterkastu í landinum, og leygardagin hevði StÍF so møguleikan at staðfesta sína støðu, sum triðbesta liðið í landinum.

## Hildu ein hálvleik

Hetta kundi best gerast við einum sigri á Kyndli, sum avgjørt ikki hevur fortíðarinnar styrki í løtuni, og sum har afturat er vikna, nú ein eym øksl forðar spælandi venjaranum í at gera nakað við spælið úti á vøllinum.

Tað eydnaðist eisini StÍF at vinna ein hampuligan tryggan sigur, men tað hoyrir eisini við til søguna, at Kyndil alla tíðina stríddist væl fyri sínari søk, og at talan var um ein sera javnan dyst fyrstu 27 minuttirnar.

Fram til tá var nevnliga millum lítil og eingin munur á liðunum. Við tveimum væl uppløgdum skjúttum í Niels Viggo Niclasen og Høgna Klein (tykist bara gerast betri, meira ábyrgd hann fær) hevði Kyndil neyðugu skotstyrkina til at halda seg inni í dystinum, men sálarliga mundi tað vera sera tungt, at gestirnir beint fyri hálvleik sluppu at skjóta trý mál á rað.

## Ferð á álopið

Tá teir so eisini fingu lagt meira sjógv niður til Kyndil tíðliga í seinna hálvleiki, stóð dysturin satt at siga ongan tíð til at venda. Hóast teir grønu royndu at gera onkran vørrin, so høvdu strandingar alla tíðina tamarhald á, og spakuliga kundi so eisini hómast hin eyðkendi StÍF hondbólturin, har presspælið í álopspartinum veruliga tagaði mótstøðuverjuna sundur.

Tað er eingin loyna, at seinnu árini hevur tað helst verið StÍF, sum hevur sýnt vakrasta álopshondbóltin, og megna teir aftur í ár at fáa veruliga gongd í hetta, so er einki at ivast í, at teir í øllum førum fara at órógva oddaliðini – og kanska meira enn tað.

## Mugu hugsa frameftir

Hjá Kyndli er setningurin hinvegin at byggja upp, og hóast breiddin er dekan ov lítil, og royndirnar eru ov fáar, so skerst ikki burtur, at liðið longu nú hevur nakrar hornasteinar at byggja liðið á. Stóri spurningurin í hesum er, hvussu leingi teir grønu kunnu halda upp á leikarar sum Janus Einar Sørensen og Høgna Klein. Fíggjarliga telist felagið ikki millum tey sterkastu, og tað má sigast at vera stórt spell, tá hugsað verður um fyrrverandi kyndilsmenn, sum nú eru at síggja í øðrum feløgum.

Beiski veruleikin er tó, at hondbólturin í dag eisini er vorðin ein spurningur um pengar, og bert tíðin kann vísa, um fyrrverandi risin – sum í dag er á knøunum – í framtíðini megnar at spæla við í hesum spæli.

## Dysturin í tølum

**Kyndil-StÍF 23-29 (11-14)**

**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Høgni Klein 7, Niels Viggo Niclasen 7, Ragnar Simonsen 3, Janus Einar Sørensen 3, Hanus Kúrberg 2, Gunnar Wardum 1

**StÍF:** Artur Johansen 7, Alexandur Johansen 4, Jón Rasmussen 4, Marius Joensen 4, Costin Dumitrescu 3(1), Sveinur Justinussen 3(2), André F. Danielsen 3

**Brotskøst:** Kyndil 4, StÍF 5

**Útvísingar:** Kyndil 5, StÍF 6

**Dómarar úr Neistanum:** Hjalmar Petersen & Kristian Johansen. Sum so ikki tað stóra at finnast at, men ta einu ferðina kundi reyða kortið verið tikið fram.



## Vinn eitt spæl

Tað ber til at vinna eitt av teimum nýggju føroysku hondbóltsspølunum á heimasíðuni hjá Toda Jónsson.

Fólk kunnu svara nøkrum spurningum, og svara tey rætt, eru tey við í lutakastinum um fimm spøl. Svarast skal áðrenn fríggjadagin, og síðani verður drigið lut, og vinnararnir fáa spælið handa av Toda sjálvum leygardagin.

Todi Jónsson kemur til Føroya í sambandi við avdúkingina av nýggja spælinum, sum verður í SMS komandi leygardag.

Saman við Toda koma eisini tveir liðfelagar úr FC Keypmannahavn.



**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 15 | 11 | - | 3 | - | 1 | 40 | 8 | 32 | 36 |
| 2 | AB | 15 | 7 | - | 6 | - | 2 | 25 | 14 | 11 | 27 |
| 3 | FCK | 15 | 7 | - | 5 | - | 3 | 22 | 13 | 9 | 26 |
| 4 | AaB | 14 | 8 | - | 2 | - | 4 | 24 | 22 | 2 | 26 |
| 5 | Esbjerg | 14 | 8 | - | 1 | - | 5 | 22 | 21 | 1 | 25 |
| 6 | FCM | 15 | 5 | - | 7 | - | 3 | 18 | 13 | 5 | 22 |
| 7 | OB | 15 | 5 | - | 5 | - | 5 | 22 | 23 | -1 | 20 |
| 8 | Viborg | 14 | 2 | - | 7 | - | 5 | 15 | 18 | -3 | 13 |
| 9 | Lyngby | 15 | 2 | - | 7 | - | 6 | 16 | 25 | -9 | 13 |
| 10 | Vejle | 11 | 3 | - | 4 | - | 4 | 19 | 35 | -16 | 13 |
| 11 | AGF | 15 | 2 | - | 5 | - | 8 | 14 | 26 | -12 | 11 |
| 12 | Silkeborg | 15 | 0 | - | 4 | - | 11 | 10 | 29 | -19 | 4 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Johan Byrial Hansen (OB), Chrsitan Høgni Jacobsen (Esbjerg)

**Støðan, danska 1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | mál | tapt munur | mál-stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 14 | 12 | - | 1 | - | 1 | 32 | 11 | 21 | 37 |
| 2 | HFK Sønderj. | 14 | 8 | - | 3 | - | 3 | 28 | 18 | 10 | 27 |
| 3 | Frem | 11 | 5 | - | 5 | - | 1 | 31 | 15 | 16 | 20 |
| 4 | Farum | 14 | 7 | - | 5 | - | 2 | 30 | 21 | 9 | 26 |
| 5 | Herfølge | 14 | 6 | - | 5 | - | 3 | 22 | 15 | 7 | 23 |
| 6 | B 1913 | 14 | 8 | - | 2 | - | 4 | 26 | 21 | 5 | 26 |
| 7 | AC Horsens | 14 | 5 | - | 5 | - | 4 | 17 | 14 | 3 | 20 |
| 8 | Randers F. | 14 | 5 | - | 5 | - | 4 | 22 | 19 | 3 | 20 |
| 9 | Brønshøj | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 24 | 27 | -3 | 18 |
| 10 | B 1909 | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 24 | 34 | -10 | 15 |
| 11 | B93 | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 20 | 31 | -11 | 12 |
| 12 | FC Aarhus | 14 | 3 | - | 5 | - | 6 | 18 | 23 | -5 | 14 |
| 13 | Hvidovre | 14 | 3 | - | 5 | - | 6 | 20 | 28 | -8 | 14 |
| 14 | Kolding IF | 14 | 3 | - | 1 | - | 10 | 27 | 39 | -12 | 10 |
| 15 | Fredericia | 14 | 2 | - | 4 | - | 8 | 18 | 22 | -4 | 10 |
| 16 | Skive | 14 | 1 | - | 3 | - | 10 | 14 | 35 | -21 | 6 |

Føroyskir leikarar: Óli Johannesen (Hvidovre), Øssur Hansen (B93), Atli Gregersen (Randers Freja)

**Støðan, hollendska toto-deildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 12 | 9 | - | 1 | - | 2 | 23 | 9 | 14 | 28 |
| 2 | Emmen | 12 | 8 | - | 3 | - | 1 | 27 | 13 | 14 | 27 |
| 3 | RBC Roo'daal | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 26 | 13 | 13 | 24 |
| 4 | ADO Den Haag | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 24 |
| 5 | FC Zwolle | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 21 | 15 | 6 | 24 |
| 6 | BV Veendam | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 25 | 18 | 7 | 21 |
| 7 | FC Volendam | 12 | 6 | - | 2 | - | 4 | 27 | 18 | 9 | 20 |
| 8 | Cambuur/L. | 12 | 6 | - | 2 | - | 4 | 19 | 12 | 7 | 20 |
| 9 | Dordrecht '90 | 12 | 4 | - | 3 | - | 5 | 20 | 20 | 0 | 15 |
| 10 | Haarlem | 12 | 4 | - | 3 | - | 5 | 16 | 18 | -2 | 15 |
| 11 | Storm/Telstar | 12 | 4 | - | 2 | - | 6 | 18 | 16 | 2 | 14 |
| 12 | Heracles A. | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 18 | 19 | -1 | 13 |
| 13 | VVV | 12 | 4 | - | 0 | - | 8 | 22 | 26 | -4 | 12 |
| 14 | G.A. Eagles | 12 | 2 | - | 5 | - | 5 | 22 | 26 | -4 | 11 |
| 15 | MVV | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 18 | 25 | -7 | 11 |
| 16 | Helmond Sp. | 12 | 2 | - | 4 | - | 6 | 7 | 20 | -13 | 10 |
| 17 | Top/Oss | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 9 | 37 | -28 | 7 |
| 18 | Eindhoven | 12 | 1 | - | 3 | - | 8 | 11 | 34 | -23 | 6 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

**Støðan, enska 3. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Plymouth | 17 | 11 | - | 4 | - | 2 | 27 | 11 | 16 | 37 |
| 2Rochdale | 17 | 10 | - | 4 | - | 3 | 27 | 17 | 10 | 34 |
| 3Hull | 16 | 9 | - | 6 | - | 1 | 31 | 14 | 17 | 33 |
| 4Luton | 17 | 10 | - | 3 | - | 4 | 38 | 22 | 16 | 33 |
| 5Mansfield | 17 | 9 | - | 4 | - | 4 | 29 | 21 | 8 | 31 |
| 6Scunthorpe | 17 | 6 | - | 7 | - | 4 | 27 | 19 | 8 | 25 |
| 7Shrewsbury | 16 | 7 | - | 4 | - | 5 | 25 | 22 | 3 | 25 |
| 8R&D | 17 | 5 | - | 8 | - | 4 | 18 | 15 | 3 | 23 |
| 9Leyton O. | 17 | 6 | - | 4 | - | 7 | 24 | 28 | -4 | 22 |
| 10Cheltenham | 16 | 5 | - | 6 | - | 5 | 24 | 25 | -1 | 21 |
| 11York | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 23 | 29 | -6 | 21 |
| 12Torquay | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 14 | 23 | -9 | 21 |
| 13Darlington | 16 | 5 | - | 5 | - | 6 | 21 | 19 | 2 | 20 |
| 14Southend | 17 | 6 | - | 2 | - | 9 | 19 | 22 | -3 | 20 |
| 15Kidderm. | 17 | 5 | - | 5 | - | 7 | 12 | 17 | -5 | 20 |
| 16Exeter | 17 | 5 | - | 5 | - | 7 | 20 | 32 | -12 | 20 |
| 17Lincoln C. | 17 | 4 | - | 7 | - | 6 | 17 | 18 | -1 | 19 |
| 18Oxford Utd. | 17 | 4 | - | 7 | - | 6 | 17 | 18 | -1 | 19 |
| 19Bristol R. | 16 | 5 | - | 4 | - | 7 | 14 | 19 | -5 | 19 |
| 20Swansea | 17 | 4 | - | 5 | - | 8 | 22 | 29 | -7 | 17 |
| 21Carlisle | 17 | 3 | - | 7 | - | 7 | 15 | 22 | -7 | 16 |
| 22Macclesfield | 17 | 3 | - | 7 | - | 7 | 12 | 19 | -7 | 16 |
| 23Halifax | 17 | 3 | - | 7 | - | 7 | 11 | 23 | -12 | 16 |
| 24Hartlepool | 16 | 4 | - | 3 | - | 9 | 14 | 17 | -3 | 15 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull City)

Kyndil-StÍF 21-24 (13-10):

# Fyrsti sigurin til StÍF

**Strandakvinnur vunnu sín fyrsta sigur leygardagin, og við hesum gjørdist javnstøðan í botninum fullkomin**

HONDBÓLTUR, KVINNUR
*Jákup Mørk*

Hóast StÍF enn átti fyrsta stigið í ár til góðar, tá tær leygardagin vitjaðu í Havn, mundu vónirnar hjá strandakvinnum vera so hampuliga undan dystinum.

Kyndil hevur ikki fingið tey bestu úrslitini higartil í ár, og tá tað so eisini var greitt, at Annika Ljósstein undir ongum umstøðum kundi spæla, gjørdust vánirnar hjá botnliðnum heldur betri, og tær mundu ikki versna av, at hvørki Ann Hansen ella Marita Hermansen í løtuna hava stundir til at gera nóg nógv við venjingina, og tískil ikki vóru á Kyndilsliðnum.

Tað var eisini StÍF, sum kom betri frá byrjanini av dystinum, men eftir at Kyndil hevði nýtt fyrstu løtuna til at fáa skil á spælinum, komu tær á heimaliðnum alt betri við. Álopsparturin riggaði so hampuliga væl, og tá so skilið á verjuspælinum ikki var av tí besta hjá nøkrum av pørtunum, gekst bara heilt væl í hond hjá Kyndli at skjóta málini, sum skuldu til, fyri at leggja gestirnar aftur um seg.

Ikki minst tóktist Lotte Sørensen vera væl uppløgd, og umframt at hon sjálv skeyt hópin av málum, so hevði hon eisini fleiri góðar fríspælingar til liðfelagarnar, sum soleiðis eisini sluppu upp í part í málskjótingini.

## Mansverja munaði

Hjá StÍF vóru tað serliga tær báðar útlendsku, sum gjørdu nógv um seg fyrstu løtuna, og seinasta partin av fyrra hálvleiki fór Kyndil tí undir mansverju av Ileanu Manolescu, og frá byrjan av seinna hálvleiki fór hendan mansverjan eisini at umfata Alinia Oluru.

Munurin ímillum seinna og fyrra hálvleik var tó tann, at meðan tað riggaði væl at taka aðra av teimum útlendsku úr spælinum, so riggaði tað minni væl við báðum, og tá so StÍF eisini fór undir at mansverja Lotte Sørensen, tók dysturin av álvara at venda.

Kyndil fór aftur til eina mansverju og at spæla fimm ímóti fimm, men meðan StÍF spakuliga fann út av, hvussu tær skuldu spæla uttan Ileanu, fann Kyndil ongan tíð heilt útav, hvussu leikast skuldi uttan Lotte. At Lotte so eisini varð somikið passiv undir mansverjuni, at hon stillaði seg heilt afturi hjá egnum málverja, bar bara enn størri fyrimun til StÍF við sær, og í løtum var tað nærum soleiðis, at gestirnir vardu seks ímóti fimm.

Fyrstu góðu løtuna av seinna hálvleiki eydnaðist sostatt StÍF at fara frá 10-13 til 17-15, og hóast Kyndil megnaði at svara aftur ta einu ferðina, so tóktist hetta takið somikið tungt, at tær grønu ikki høvdu stórvegis at bjóða upp á eftir hetta.

Gestirnir hildu stútt fast um leiðsluna, og tað var ikki fyrr enn í allar seinasta minuttinum, at Kyndil royndi at seta ferð á tá tær høvdu bóltin og fara út at jagstra gestirnar, tá hesar høvdu hann, men tá var ov seint. Gestirnir høvdu tá vunnið seg fýra mál framum, so har gjørdist einki.

## Botnstríðið

Sigurin hjá StÍF merkti, at tað nú aftur er púra javnt í botninum, har Sóljan, StÍF og Kyndil hava vunnið hvør sin dyst. Serstakliga hjá Kyndli man hesin leiklutur kennast lítið hugaligur, men sum støðan er í løtuni, so fær Kyndil ikki gjørt stórvegis við hetta.

Breiddin í hópinum er ov lítil til, at liðið kann standa nóg sterkt ígjøgnum ein heilan dyst - og tíansheldur eina heila kapping - og tá so stuðulsleikarar nú eisini tykjast at fella frá, skulu tær grønu bert hava eitt í huganum, og tað er at halda lív í tilveruni í bestu deildini. Tað eigur liðið eisini at vera nóg sterkt til, men leygardagin sást tó lítið til hetta.

Hjá StÍF mundi tað kennast ikki sørt hugagott, at tær soleiðis vunnu sær fyrstu stigini á árinum. Móti Sóljuni sá annars út til, at strandakvinnurnar einki høvdu at gera i bestu deildini, men hesum fingu tær so afturvíst hesaferð.

Verður hugt at liðnum sum heild, so er heldur einki at ivast í, at liðið hevur møguleikar at standa seg í deildini. Sjálvandi eru tær báðar útlendsku størstu álitini, men at aðrar eisini kundu gera um seg, var ikki minst Sunfríð eitt gott dømi um.

Tað er tó einki at ivast í, at StÍF man iðra seg um, at fleiri av stinnastu hondbóltsleikarunum áv Skálafjørðinum nú eru at síggja í øðrum feløgum. Hevði liðið umframt núverandi hópin eisini havt Sóley Mikkelsen, Alis Høghamar og Palmu Petersen, hevði støðan helst verið ein heilt onnur. Hinvegin ber ikki til at nýta tær, sum ikki eru til staðar, so StÍF má standa seg við teimum, sum eftir eru, og tær kunnu hóast alt vísa seg at gerast hampuliga stinnar.

## Dysturin í tølum:

Kyndil-StÍF 21-24 (13-10)
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Laila Jespersen 6, Lotte Sørensen 5, Ann Mari Wang 3, Palma Petersen 3, Anja Johannesen 3(1), Erla Smith 1
**StÍF:** Sunfríð B. Jacobsen 6(2), Alina Oluru 5, Ileana Manolescu 4, Anna Maria Bærentsen 4, Guðrun Ólavsdóttir 3, Marita Hansen 1, Bjørg Mikkelsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, StÍF 4
**Útvísingar:** Kyndil 6, StÍF 6
**Dómarar úr Neistanum:** Hjalmar & Kristian. Høvdu ein hampuligan lættan dyst, sum teir ikki gjørdu stórvegis hóvasták burturúr.

## Botndysturin endaði javnur

Um vikuskiftið tvey av aftaru liðunum í manshondbólti í Runavík. Tað eydnaðist Tjaldri at fáa fyrsta stig sítt í hesum kappingarárinum, tá teir spældu javnt, 24-24, ímóti KÍF.

Kollfirðingar vunnu seinast ímóti Kyndli, men hesaferð kláraðu teir ikki at halda seg frammanfyri Tjaldur.

Javnleikurin gjørdi tó, at KÍF fór fram um Kyndil, sum tapti fyri StÍF.